# Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 27.10.2019

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| Heiti:<br><br>Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018 og 2019 | Broytt heiti:<br><br>**1.** Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019 og 2020 |
| **§ 1.** Rættindahavari, sum veiðir av rættindum, Føroyar ráða yvir, skal rinda eitt veiðigjald, sum verður lagt á hvørt fiskað kilo í rundari vekt av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til makrel, norðhavssild ella svartkjaft í 2018, tó undantikið kvotu, sum er keypt á uppboðssølu.<br>*Stk. 2. ...* | **2.** Rættindahavari, sum veiðir av rættindum, Føroyar ráða yvir, skal rinda eitt veiðigjald, sum verður lagt á hvørt fiskað kilo í rundari vekt av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til makrel, norðhavssild ella svartkjaft í 2018, 2019 og 2020, tó undantikið kvotu, sum er keypt á uppboðssølu. |
| Stk. 2. Veiðigjaldið, sambært stk. 1, er<br>1) ...<br>2) 0,75 kr. fyri hvørt fiskað kilo í rundari vekt av norðhavssild, og<br>3) ... | **3.** Í § 1, stk. 2, nr. 2 verður "0,75 kr." broytt til: "0,50 kr." |
| **§ 2.** Veiðigjaldið, sambært § 1, er ikki galdandi fyri eigarar av fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært §§ 73 og 74 í løgtingslóg um sjófeingi. | **4.** § 2 verður orðað soleiðis:<br><br>"**§ 2.** Veiðigjaldið, sambært § 1, er ikki galdandi fyri eigarar av |

| | |
|---|---|
| | fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært §§ 18 og 19 í løgtingslóg um sjófeingi.” |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020. |